# Vandaðu veður

**Norrøna, sum fór til Íslands mánadagin, vendi aftur fyri veður. Skipið verður liggjandi á Havnini, til farið verður til Danmarkar**

SJÓMANSSKAPUR
*Edvard Joensen*

Norrøna vendi aftur av íslandstúrinum, sum byrjaði í Havn mánadagin. Illveður var á leiðini, og gjørt varð av at venda aftur til Havnar, har skipið nú liggur.

Illveðrið, sum væntandi var at koma hendanveg, liggur í skrivandi stund millum londini, og skiparin á Norrønu metti tað vera so mikið ófantaligt, at hann valdi heldur at koma heilur aftur til lands, enn at royna at halda ferðaætlanina við vanda fyri, at skaði kundi henda á skip og farm.

Norrøna kom á Havnina fyrrapartin týsdagin og verður liggjandi, til hon fer til Danmarkar hóskvøldið, sigur Áki Jespersen á Smyril Line. Hann hevði einki frætt um skaða umborð yvirhøvur, segði hann við Sosialin beint eftir, at Norrøna var komin aftur til Havnar.

Ikki bara millum londini er illveður. Eisini úr Íslandi fréttist frá rættiliga ringum veðri týsdagin. Sagt varð millum annað, at flogferðslan á Eysturlandinum lá still, og at á Seyðisfirði lá allur býurin í streymloysi.



*Sterki reyði liturin vísir nógva vindin, sum var á rutuni há Norrønu, tá gjørt varð av at venda aftur til Haavar heldur enn møguliga at leggja seg at andøva millum londini*

# Halda hánt um ferðslulógina

**Summi fólk, sum kama ið bili á flogvøllin, virða ikki ferðslulógina, men koyra og parkera, sum teimum lystir, hóast forboð er týðuliga merkt**

FERÐSLA
*Edvard Joensen*



*Hóast týðuligt forboð er fyri at koyra inn á økið oman fyri parkeringaplásisni við flogvøllin, eru tað fólk - hóast tey ivaleyst hava koyrikort - sum ikki tykjast vita, hvat runda, reyða skeltið við hvítu strikuni merkir. Tað kostar teimum so eina parkeringsbót, tá løgreglan kemur framvið*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Vágar:** Hóast góðir møguleikar eru fyri parkering við flogvøllin, eru fólk, sum velja at seta bilarnar ólógliga. Tað kann so enda við at kosta teimum fleiri ferðir tað, sum tað hevði kostað, um tey settu bilarnar á eftiransaða parkeringsøkið við flogvøllin.

Parkeringsøkini við flogvøllin eru skpað ymsan hátt. Summi við tíðaravmarkaðari parkering, har ikki er neyðugt at gjalda, um ein heldur ásettu tíðirnar.

Onnur øki kunnu brúkast móti gjaldi, og har er eisini fólk, sum ansar eftir bilunum. Eitt nú, tá fólk eru uttanlands og ferðast.

Men so eru eisini øki uttan fyri góðkendu parkeringsøkini, sum ikki eru ætlað at seta bilar á, og har tað eisini er beinleiðis viðmerkt, at forboð er. Kortini eru tað fólk, sum av einihvørjari orsøk velja at seta sínar bilar júst har.

Men tey, sum gera tað, kunnu vænta at koma aftur til eina bót, sigur Regin Jespersen, sýslumaður í Vágum. Løgreglan skrivar regluliga bøtur á parkeringsplássunum við flogvøllin, sigur hann. Bæði á tíðaravmarkaðu plássunum, og sálvandi eisini har, sum beinleiðis forboð er at seta bilarnar.

Fólk, sum hava sítt dagliga yrki á flogvøllinum, kæra seg javnan um, at tað er so ringt hjá teimum at finna parkeringspláss, tá tey koma til arbeiðis. Ofta endar tað við, at tey noyðast at seta bilarnar frá sær á tíðaravmarkaðu parkeringsøkini, tí økið, sum tey annars áttu at havt atgongd til, er upptikið av fremmandum bilum. Úrslitið er mangan ein áhaldandi gongd út á parkeringsøkið at flyta bil og parkeringsskivu. Hetta fer við nógvari tíð og er sera órógvandi fyri arbeiði teirra, verður sagt.

Tað er Landsverk, sum eigur parkeringsøkini og hevur ábyrgdina av merkingini.

Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverki, sigur, at økini framman fyri terminalin eru merkt, sum tey skulu, og at tað so er upp til løgregluna at ansa eftir, at ásetingarnar verða hildnar.

Hann sigur, at nýggja parkeringsøkið, sum gjørt er, gevur pláss fyri fleri parkeringsbásum bæði til stutt- og langtíðarparkering.

Stutttíðarparkeringin er tveir tímar, og hon er ókeypis. Treytað av, at reglurnar verða hildnar. Langtíðarpearkeringin kostar 30,- krónur um dagin. Men so er eisini eftirlit við bilinum, meðan hann stendur á økinum.

Oyvindur Brimnes sigur, at merkingin er liðug, men enn væntar at hegnað nýggja langtíðarøkið av. Sum er, er tað bert avmarkað við betongklossum, og pengar eru í løtuni ikki tøkir til meira, sigur hann.

Um økið yvir móti hangarinum, har ætlanin er, at starvsfólkini skulu kunnu seta sínar bilar, sigur hann, at Landsverk eigur økið, men hevur latið tað til Statens Luftfartsvæsen at umsita. Tað má so vera upp til SLV og løgregluna t hava eftirlit við, hvsussu økið veður nýtt, heldur stjórin á Landsverki.

Landsverk hevur gjørt eina fyribils avtalu við eitt privat vaktarfelag um at hava eftirlit við langtíðarparkeringini. Avalan hevur riggað væl og er eisini longd. Ætlanin er endaliga at bjóða hana út nakað skjótt, sigur Oyvindur Brimnes.

# Stendur í stað

**Talið av ferðafólkum, sum ferðaðust um flogvøllin í Vágum fyrstu tríggjar ársfjórðingarnar í ár, er á leið tað sama, sum tað var somu tíð í fjør**

FERÐAFÓLKAFLUTNINGUR

Fyrstu níggju mánarnar í ár hava 132.599 feðfólk ferðast um flogvøllin í Vágum. Hetta er eitt hálvt prosent meira enn somu tíð í fjør.

Fyri september mána er talið eisini á leið tað sama sum hendan mánan í fjør. Tó bara á leið, tí í ár ferðaðust 172 fólk færri um flogvøllin í september, enn tey gjørdu í september í fjør. 13.074 móti 13.246, sum er ein minking upp á 1,3 prosent.

Á Danmarkarrutunum er ein vøkstur í ferðafólkatalinum at merkja. Men til Íslands og Bretlands er minking. Eisini eru komur og fráfeðrir fækkaðar í mun til í fjør, sigur Statens Luftfartsvæsen í tíðindaskrivi um dagarnar.

Eisini postur og farmur, sum flutt eru um flogvøllin, eru á leið tað sama í september í ár, sum í september í fjør.

Men samanlagt fyri fyrstu tríggjar ásfjórðingarnar vísa hagtølini, at av posti er heldur minni flutt loftvegis, men farmaflutningurin tykist vera í vøkstri.

**ej**



*Flogførini, sum flúgva millum Vágar og útheimin, flyta umleið líka nógv fólk í ár, sum tey gjørdu í fjør. Tó er vøkstur á Danmarkarrutunum og minking á øðrum rutum*

*Mynd: Edvard Joensen*



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Tveir 40 ára starvsdagar



Fríggjadagin 1. oktober var móttøka í skúlanum á Ziskatrøð í Klaksvík. Høvið var tað, at tveir av lærarunum 1. august í ár høvdu 40 ára starvsdag. Teir eru Helgi Danielsen og Asbjørn Lómaklett. Merkisvert við teimum báðum er, at teir frá smádreingi av, og inntil teir høvdu lokið læraraprógv á Føroya Læraraskúla í 1964, fylgdust á útbúgvingarleiðini, og at teir eftir at hava lokið prógv fingu starv í sama skúla.

Helgi Danielsen, sum er føddur í Klaksvík 8. februar í 1941, hevur øll árini síðan hann leyk lærararprógv, arbeitt í skúlanum í Klaksvík, har hann serliga hevur verið kendur fyri síni serliga góðu evni í náttúrufrøði ella fysikk.

Asbjørn Lómaklett er føddur í Klaksvík 18. november í 1940. Hann var lærari í Klaksvík 1964-70, á Húsum og Syðradali 1971-72 og aftur í Klaksvík síðani 1972. Skúlaárið 1970-71 var hann á ársskeiði á DLH.

Tá ið skúlin í Klaksvík í 1979 varð býttur sundur í Ósáskúlan og Skúlan á Ziskatrøð, gjørdist Asbjørn skúlastjóri á Ziskatrøð. Hetta starvið hevur hann nú røkt í eina fjórðings øld. Hann er framvegis skúlastjóri, og Helgi Danielsen er framvegis millum lærarnar á Ziskatrøð.

Bæði Helgi og Asbjørn funnu sær konu úr syðra partinum av Suðuroy. Helgi er giftur við Sigurbjørg, fødd Jacobsen og ættað úr Sumba, og Asbjørn er giftur við Michalu, fødd Toftum og ættað sunnan úr Vági.

Nógv fólk varð savnað til móttøkuna fríggjadagin, og fleiri nýttu høvi at bera eina heilsu. Millum hesi var Eigil Hentze, varaskúlastjóri á Ziskatrøð, Steinbjørn Jacobsen, býráðsformaður, Símun Petur Hjelm, skúlastjóri í skúlanum við Ósánna, og Jan Danielsen, sonur til Helga Danielsen. Asbjørn Lómaklett hugleiddi og takkaði vegna teir báðar, sum nú hava verið lærarar í 40 ár, og sum nú eru elstu lærararnir í skúlanum á Ziskatrøð.

## Doru á Torvlaðnum 50 ár

Í dag mikudagin 6.oktober fyllir ein kendur havnarmaður úr Rumerniu 50 ár.

Doru á Torvlaðnum er føddur í Bucarest í 1954 og búsettist í Føroyum í 1989.

Fyrstu árini arbeiddi hann á Jarðfrøðisavninum, sum tá var ein mikrostovnur við 3-4 starvsfólkum. Seinni gjørdist hann goymsluleiðari á savninum, tá tað varð lagt saman við Oljumálastýrið í Brekkutúni. Hetta starv hevur hann røkt í sløk 10 ár.

Størsti áhugugi hansara er útróður. Síðsta hálva árið hevur hann róð út burtur av, við snotuliga báti sínum. Hóast føddur stórbýarbúgvi, so trívist hann eina best á sjónum. Doru gongur høgt upp í yrkið sum útróðrarmaður og hevur sett seg gjølla inn í serligu viðurskiftini, sum eru galdandi kring Føroyar.

Hann hevur funnið sítt pláss her í Føroyum og fáur er meiri heimkærur enn hann.

Doru er giftur Guðrið, og tey eiga børnini Sólveig 5 ár og Poul Jóhan 4 ár.



## Hans Eiler í farloyvi

**Hans Eiler Hammer, sóknarprestur í Klaksvík, fer í farloyvi frá 12. oktober og umleið tveir mánaðir fram. Hann fer á skúla í Stavanger at nema sær meira kunnleika til at arbeiða við menniskjum við sálarligum trupulleikum**

FARLOYVI
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Hans Eiler Hammer, sóknarprestur í Klaksvík, fer á skúlabonk í Noregi í tveir mánaðir frá 12. oktober*

*Mynd: Bárður Lydersen*

**Klaksvík:**
Um eina viku fer Hans Eiler Hammer av landinum til Noregs. Hann skal á eitt skeið á Missións Háskúlanum í Stavanger í Norra, har hann skal nema sær størri kunnleika innan sálarrøkt, við serligum atliti til menningartarnað, sálarliga sjúk og tey sum hava verið út fyri brádligum missi í sambandi við vanlukkur.

– Hetta er nakað, sum hevur ligið í luftini í eina tíð. Eg havi hugsað um tað í eina tíð, sigur sóknarpresturin í Klaksvík.

Hann greiðir frá, at hann ynskir sjálvur at nema sær meira útbúgving innan sálarliga økið.

– Tað er viðhvørt, at ein kemur út fyri viðurskiftum, har ein hevði viljað havt meira kunnleika um eitt ávíst øki, sigur hann.

Skeiðið, sum Hans Eiler skal á er upprunaliga eitt hálvt ár, men hann hevur fingið loyvi til bert at taka teir seinastu mánaðirnar.

Farloyvið hjá honum er frá 12. oktober til 17. desember. Hann visti ikki, hvør ella um nakar kemur fast í hansara stað, meðan hann er burtur.

– Tað er helst fyrst og fremst eitt ting, sum Niels Pauli og bispur gera av, sigur Hans Eiler Hammer, sóknarprestur.

**Dagurin**
**6. oktober. Broderus.** Ókent halgimenni.

**90 ára føðingardagur**

Í dag, 6. Oktober, verður Margit Dam, Húsavík, 90 ár. Dagurin verður hildin saman við familjuni frá kl. 16–18.



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin